

Eldar Sætre, forstjóri í Statoil. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Lægsti oljuprísurin farna hálva árið

**Jógvan Hugo Gardar**

28.07.2015 - 22:00

Oljan.fo

Í morgun kostaði eitt fat av Norðsjóvaroljuni Brent 53 dollarar. Hetta er tann lægsti prísurin farna hálva árið. Men oljufeløgini rokna við at prísurin kemur at hækka við 50 prosentum, til omanfyri 80 dollarar. Men tað verður ikki fyrrenn í 2018, skrivar E24.

Oljuprísurin hækkaði nakað seinnapartin, og kom uppá 53,77 dollarar fyri fatið.

Eldar Sætre, forstjóri í Statoil, segði aftaná sína framløgu av halvársrokniskapinum í morgun, í samrøðu við E24, at ein prísur sum liggur millum 50 og 60 dollarar ikki er av leið í verandi støðu. Hann legði afturat at Statoil heldur fast við tær metingarnar sum blivu lagdar fram í vár, og sum siga at oljuprísurin kemur at hækka, og at 80 dollarar er ikki av leið at hugsa í 2018.